# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI
# MATR. NR. 1045q Á HEYGNUM MIKLA




Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa økið matr. nr. 1045q á Heygnum Mikla til íbúðarbygging.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at verandi vinnubygningur á økinum kann umbyggjast til íbúðir.

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1.

2.3 Økið er uml. 1.720 $m^2$ til støddar og liggur sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í A1-øki í 3. grundumráði.

2.4 Sambært kap. IV, §5 í almennu byggisamtyktini, er umráðisparturin A1 í 3. grundumráði lagdur til sethúsabygging. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt nátúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir..

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Umbygging av virkisbygningi til íbúðir og tilhoyrandi parkeringsplássi

3.2 Vinna í umhvørvisflokki 1 og 2 kann loyvast í økinum.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Verandi bygningur má ikki byggjast út.

4.2 Byggjast kann ikki meira á ognini

## § 5. PARKERING

5.1 Parkering verður skipa sum felags parkering.

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

6.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

7.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

7.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




# Serstøk byggisamtykt

Fyri matr. nr. 1045q í Tórshavn

Mark um samtyktarøkið

Íbúðarbygging

Góðkend: 16.02.2017

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

22. februar 2017
**Mál**: 16/01267-9
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

***Góðkenningarskriv***

**Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1045q á Heygnum Mikla**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfest 10. november 2016, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1045q á Heygnum Mikla til góðkenningar.

Serstaka byggisamtyktin fyri matr. nr. 1045q hevur til endamáls at gera tað gjørligt at innrætta íbúðir í verandi vinnubygningi á økinum.

Broytingin hevur ligið alment frammi frá 26. september til 17. oktober 2016. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 7. november 2016, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og hevur í ummæli sínum, dagfest 11. januar 2017, mælt til at umsóknin um serstaka byggisamtyktin fyri matr. nr. 1045q á Heygnum Mikla verður gingin á møti.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini.

Vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1045q á Heygnum Mikla.

Hjálagt byggisamtyktartekstur fyri serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1045q við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo